# Hjálpa indiánarum í Paraguay

**38 børn í frítíðarskúlanum oman Mattalág í Havn hava seinastu vikuna spælt indianarar. Í gjár vitjaði Flemming Petersen hjá teimum, har hann við orðum og myndum greiddi frá indianaralívi í Paraguay**

BARNAGARÐUR
*Rólant Waag Dam*
*rolant@sosialurin.fo*

Hesi 38 børnini, ið ganga í 1. og 2. flokki, hava brúkt nógva tíð á verkstaðnum í síðstuni. Tey hava seymað klæði, gjørt perlur og pynt, málað andlitið og grillað.

Frítíðarskúlin oman Mattalág í Havn hevur indianaraviku, og børnini eru ovurfegin. Í gjár vitjaði Flemming Petersen hjá teimum. Flemming er ævintýrari og tónleikari, og hevur búð millum indianarar í Paraguay. Við orðum og myndum greiddi hann frá síni tíð ímillum indianarar, meðan børnini sótu pinnastill og lurtaðu.



Børnini í frítíðarskúlanum oman Mattalág í Havn, saman við starsfólkum og Flemming Petersen, sum stendur á knæ mitt í myndini. Myndina fer hann at taka við sær til Paraguay at vísa indianarabørnunum har

*Mynd: Jens Kr. Vang*

## Savna pengar

Men indianaravikan er meiri enn spæl, andlitsmáling og søgur. Børnini í frítíðarskúlanum oman Mattalág hava eisini savnað pening saman, sum tey ætla at geva indianarabørnunum í Paraguay. Flemming Petersen fer at taka innsavnaða peningin við sær næstu ferð hann vitjar í Paraguay. Hann sigur, at helst fara indianararnir at brúka pengarnar til eina gravimaskinu, sum fer at lætta nógv um teirra arbeiði.

Í frítíðarskúlanum oman Mattalág ætla tey, at indianaravikan verður eitt afturvendandi tiltak, og at tey aftur næsta ár kunnu hjálpa indianarunum í Paraguay.

## VEÐRIÐ



Petur Skeel Jacobsen greiður frá um veðrið




**Veðrið í morgin og leygardagin:**
Fleyr til gul av ymsum ættum, seinni mest av landnyrðingi. Turt og sólglottar, men mjørkaflókar. Hitin millum 8 og 12 stig.




**Veðrið sunnudagin:**
Gul til stívt andøvsgul av landnyrðingi og yvirhøvur turt og sólglottar. Hitin millum 9 og 12 stig.

**Veðrið mánadagin og týsdagin:**
Lot til andøvsgul av landnyrðingi, týsdagin lot av ymsum ættum. Yvirhøvur turt og sólglottar og hitin millum 8 og 12 stig.

## Hitalagið kring knøttin

| | |
|---|---|
| Illulisat | 12 |
| Nuuk | -- |
| Qaqortoq | 9 |
| Ammassalik | 8 |
| Saint John's | -- |
| Halifax | -- |
| Reykjavík | 11 |
| Seyðisfjørður | 9 |
| Tórshavn | 10 |
| Lerwick | 10 |
| Aberdeen | 10 |
| London | 16 |
| Tromsø | -- |
| Bergen | 22 |
| Oslo | -- |
| Stokkhólm | 25 |
| Keypmannah. | 21 |
| Helsinki | 21 |
| Moskva | 18 |
| Berlin | 22 |
| Warzawa | 27 |
| Kiev | 22 |
| Bukarest | 25 |
| Paris | 24 |
| Madrid | 24 |
| Róm | 22 |
| Malorca | -- |
| Athen | 25 |
| Malta | 23 |
| Tunis | 29 |
| Beijing | 32 |
| New Dehli | 39 |
| Bangkok | 34 |
| Jakarta | 31 |
| Sydney | 14 |
| New York | 21 |
| Miami | 28 |
| Los Angeles | 18 |
| Meksikobýur | 25 |
| Panama | -- |
| La Paz | 15 |
| Rio de Janeiro | -- |
| Buenos Aires | 19 |

## LUFTTRÝSTIÐ




**Í gjár:**
Eitt hátrýst, 1016 hPa. vestan fyri Føroyar fer spakuliga eystureftir.




**Í dag:**
Hátrýstið yvir Føroyum fer spakuliga norðureftir. Lágtrýstið sunnan fyri Írland fer móti Norðsjónum.

## HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 11/6 kl. $06^{00}$ – 12/6. $06^{00}$. Hitin í gjár: 9,9°
Minsti hiti máldur í juni: 0,0° - Mesti hiti máldur í juni: 20,0°

## AVFALLIÐ




Avfallið: 0,0 mm – mált frá 11/6 kl. $06^{00}$– 12/6 kl. $06^{00}$
Avfallið higartil í juni: 3,0 mm


**Tiltøk í Miðlahúsinum í juni**




- altíð eitt tiltak miðlahúsinum

**14. juni**
**Blóðgevarafelagið**

**27. juni kl. 21**
**Summartónar**


## VESTFALLSKYRRINDI

8. juni — Seinna kvarter
12. juni — Mánin næstur jørðini
15. juni — Tendring

Kelda. Álmanakkin 2007

| Dagur | Suðuroyar-/ Vágafirði fp. | sp. | Skúvoyar-/ Skopunarfirði fp. | sp. | Hestfirði/ Sundalagnum fp. | sp. | Vestmanna-sundi fp. | sp. | Mykines-firði fp. | sp. | Nólsoyar-firði fp. | sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | sp. | Leirvíksfirði/ Haraldssundi fp. | sp. | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði fp. | sp. | Hvanna-sundi fp. | sp. | Fugloyar-firði fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 14. Juni | 06.24 | 18.55 | 05.24 | 17.55 | 05.39 | 18.10 | 08.24 | 20.55 | 09.24 | 21.55 | 04.39 | 17.10 | 03.39 | 16.10 | 06.39 | 19.10 | 07.39 | 20.10 | 06.09 | 18.40 | 07.24 | 19.55 |
| 15. Juni | 07.26 | 19.57 | 06.26 | 18.57 | 06.41 | 19.12 | 09.26 | 21.57 | 10.26 | 22.57 | 05.41 | 18.12 | 04.41 | 17.12 | 07.41 | 20.12 | 08.41 | 21.12 | 07.11 | 19.42 | 08.26 | 20.57 |
| 16. Juni | 08.27 | 20.57 | 07.27 | 19.57 | 07.42 | 20.12 | 10.27 | 22.57 | 11.27 | 23.57 | 06.42 | 19.12 | 05.42 | 18.12 | 08.42 | 21.12 | 09.42 | 22.12 | 08.12 | 20.42 | 09.27 | 21.57 |
| 17. Juni | 09.25 | 21.53 | 08.25 | 20.53 | 08.40 | 21.08 | 11.25 | 23.53 | - | 12.25 | 07.40 | 20.08 | 06.40 | 19.08 | 09.40 | 22.08 | 10.40 | 23.08 | 09.10 | 21.38 | 10.25 | 22.53 |
| 18. Juni | 10.18 | 22.43 | 09.18 | 21.43 | 09.33 | 21.58 | - | 12.18 | 00.53 | 13.18 | 08.33 | 20.58 | 07.33 | 19.58 | 10.33 | 22.58 | 11.33 | 23.58 | 10.03 | 22.28 | 11.18 | 23.43 |